Viðmerkingar

HÁKUN OG FÓLKAFLOKKURIN OG SJÓMARKIÐ

Vit minnast, hvussu Hákun Djurhuus, so ófatiliga »smigrandi« og »lefrandi« yvir fyri dønum bardist fyri 3-mílumarkinum í statsministeriinum, har ið hann kvað vísuna um »havenes frihed«, altso »frihed« fyri bretsku trolararnar at fiska inn at trýmílamarkinum.

Vit minnast, hvussu ið hann bardist fyri sama sjónarmiði í landsstýrinum!

Vit minnast, hvussu hann var ítarsti garpur á tingi at fáa samtykt trýmílamarkið av nýggjum á tingi við 10 ára fiskimarkssáttmálanum frá 1957 til —67!

Vit minnast, hvussu hann við sínum monnum og Erlendi Paturssyni við hansara monnum beinavegin sýtti at tala lut í samráðingunum í London um broyting av sáttmálanum 57—67 til tað, ið hann nú varð!

Er tað ikki at fáa ilt fyri hjartað av nú at hoyra hann Hákun og hans ara líkar tala reypandi um sjómarksmál, um 12 míl, um at vit javnaðarmenn og núsitandi stjórnarflokkar við broytingini av tí vanlukku sáttmálanum av 1957 skulu hava svikið løgtingsins samtykt um at krevja 12 míla sjómark út frá beinum linjum!

Hesir menn, sum soleiðis hava svikið í fiskimarksspurninginum eiga ongan rætt til at tala.

Annars er tað at siga, at stjórnarflokkarnir — javnaðarmenn, sambandsmenn og sjálvstýrismenn — hava so sanniliga ikki svikið.

Í síni samtykt av broytingini undir strikaðu teir at teir pricipielt hildu fast við 12 míla mark út frá beinum linjum, og at broytingin bert galt fyri tíðina, til tess hon kundi uppsigast. Og sum kunnugt varð uppsagnartíðin stytt við 4 árum, frá 1967 til 1963.

Vit vóru so við broytingini:

1) Uppsagnarfreistin stytt við 4 árum.

2) sjómarkið flestu staðni 6 míl ístaðin fyri 3 míl, men ongastaðni minni enn í 1957—67 sáttmálanum hjá Hákuni og fólkaflokkinum,

3) stór friðað øki sunnan fyri, vestan fyri og norðan fyri.

ÚRSLITIÐ AV TING- OG LANDSSTÝRISARBEIÐINUM, SÍÐAN LANDSSTÝRIÐ VARÐ SETT:

Málgagn fólkaflokksins og tjóðveldisins er so rørandi samd um, at nýggja landsstýrið og tess flokkar á tingi hava einki avrikað, síðan nýggja stjórngongan varð gjørd um nýmyndan av landsstýri.

Tað er tso einki, at fólkapensjónin og avlamispensjónin eru framd!

Tað er so einki, at peningur er veittur til at til SEV!

Tað er so einki, at minstalønartrygdirnar á útróðramonnum í Grønlandsbøttar!

Tað er so einki, at lønarkor verður bøtt uttan útreiðslu, men hevur ning fyri landskassan!

Tað er so einki, at fiskimarkið er flutt úmílum til 12 míl fyri allar tær an bretar, og frá 3 míl fyri seinast nevndu, at vit hava ingið stór óki millum 6 og 12 friðað móti bretskum trolfiskiskipum.

Tað er so einki, at vit hava fingið fatað a finansskipan uppá 100 milliónir, ðvikjandi bygging av skúlum, vegum, sjúkrahúsum, studentagarði, úla við kostdeild, handilsskúla- og leirnámi, um hetta vísir seg við kønamanna kannan at eiga møguleika at bera seg, o. s. fr!

Hvat gjørdi fólkaflokkurin øll tey 8 árini, hann satt við róðrið?

Hvat gjørdi hann ímóti hesum?

Ein av fólkaflokksmonnunum — oddamonnunum enntá — segði við Hákun Djurhuus, at hetta stýri hevði gjørt meiri í 8 mánaðar enn fólkaflokksstýrið gjørdi í 8 ár!

ØLL SLØG AV
MÁLING

STÓRT ÚRVAL
TAPET

LINOLEUM
CONGOLEUM
VILANYL
VINYL

HARÐAR OG BLEYTAR
Isoleringsplátur

Plasticplátur
Flisaplátur
Congowall

KOKUSLEYPARIR
KOKUSMÁTTUR
FORLEGGJARIR

VEGGJA- GÓLVTJØRUPAPP

RÚTAGLAS

GARDINSTENGUR
RULLUGARDINUR

Poul Arne Poulsen
Tvøroyri

Lastvognskoyring
við vippu
Telefon 2346
Leivur Johannesen

GROT OG SKERVUR

Øll, ið vilja keypa skerv ella grót, eiga at venda sær til kommunukantórið.

Grót og skervur megu verða goldin fyrst, áðrenn tey verða heimtað.

Bilstjórar verða ámintir, at teir ikki kunnu heimta grót ella skerv uttan við einum limi av vegnevndini ella einum umboðsmanni fyri kommununa.

FRØÐBIAR SØKNAR KOMMUNA

FÆRØSK MARGARINE
Vita No 1
VITAMINISERET
FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

PRE
Eitt hitt mest kenda vaskievni.
HEILSØLA
H. L. VANG HANSEN
tlf. 1566 box 134 Tórshavn.

FORLAGIÐ FRAMHALD
TÓRSHAVN

Heðin Brú:
Feðgar á ferð

bundin í skinn við gullstavum aftan er eiggilig bók at eiga og/ella geva.
Sendið seðilin inn, og tygum fáa bókina móti postkravi fyri 15 krónur ialt.

Sendið mær eintak/tøk: *Heðin Brú: Feðgar á ferð*, bundna í skinn við gullstavum aftan fyri 15 kr. eintakið.

HALDIÐ SOSIALIN

FØROYA BANKI
TÓRSHAVN
Telf. 1350

Latið ikki virðisskjøl ella annað virðismikið týnast av eldi ella stuldri.
Leigið tygum, meðan tíð er, eina

BANKABOX

tryggasta staðið til varðveitslu av tílíkum.
Gjaldið er lágt, bert **15 kr. um árið**

Vit geva tygum fegin allar nærri upplýsingar, bert tygum ganga inn á gólvið.